

Ein grunasamur venjari á veg av vøllinum í Beograd eftir 0-7 tapið

Páll Guðlaugsson:

Teir kunnu ikki vera so góðir enn

Salzburg (Sosialurin)
»Tá vit fóru til Jugoslavia at spæla móti kanska bestu fótbóltsmanning í Europa í dag, væntaðu vit sjálvsagt, at vit fóru at tapa«, sigur føroyski landsliðsvenjarin, Páll Guðlaugsson. »Men vit vórðu tó rættiliga vónbrot nir av, at tapið skuldi gerast so stórt sum 7-0«.

Páll undirstrikar tað, sum hann eisini segði við Sosialin eftir tann dystin um, at spælararnir ikki spældu eftir lagda taktikkinum, og at úrslitið tí ikki gjørdist júst sum væntað var frammanundan.

Ikki lumpast aftur

»Men hesaferð mugu vit ikki lata okkum lumpa av einum liði, sum er klókari enn vit«, sigur hann. »Vit mugu gera sum í Landskrona og Belfast, har vit ansaðu betur eftir og royndu at verja, meðan vit so tóku teir kjansirnar, vit kundu fáa undir dystinum«.

Eftir tað ikki alt ov góða úrslitið í Beograd verða helst gjørdar onkrar broytingar á liðnum í kvøld, men seinnapartin í gjár vildi Páll ikki út við, hvørjar hesar broytingar fara at vera.

Tveir nýggir við

»Onkur spælari, sum ikki livdi upp til forvæntningarnar og krøvini, um eg so má siga, má helst setast á bonkin, men talan verður í øllum førum ikki um heilt stórar broytingar kortini«, sigur landsliðsvenjarin.

Men verður mett útfrá tí, venjingin seinastu dagarnar hevur víst, verða tveir spælarar sum Jákup Símun Simonsen og Jens Erik Rasmussen hesaferð við frá byrjan — helst í staðin fyri Magna Jarnskor og Kurt Mørkøre ella Jan Allan Müller.

Ikki so góðir

Spurdur, sum hann kennir nakað til eysturríkska landsliðið, sum tað sær út í løtuni, sigur Páll, at tað ger hann fyri so vítt ikki.

»Eysturríkski venjarin hevur skift seks ella sjey spælarar út herfyri, og teir nýggju menninar kenni eg ikki, men eg rokni neyvan við, at hesir longu nú kunnu vera so væl samanspældir, at teir saman útgera eitt serliga gott landslið«, sigur hann. »Vánaligu úrslitini hjá Eysturríki í seinastuni í fleiri dystum geva eisini eina greiða ábending um, at nógv er á teirra liðið, sum ikki virkar sum tað skal«.

»Men«, sigur Páll at enda. »Vit fara ikki í kvøld at dúva uppá, hvussu tingini virka ella ikki virka hjá teimum, tí tað hjálpir ikki okkum nakað. Vit mugu sjálvir gera okkara stóra innsats, vilja vit hava eitt úrslit, og tað verður so fyrst og fremst uppgávan í kvøld«.

hj.



- Føroyska spælið skal vera defensivt í kvøld, sigur Páll Guðlaugsson, venjari

Eingin skaddur

Men Abraham Hansen og Allan Mørkøre fingu smásnuddir undir venjingini mánakvøldið, sum tó ikki fara at forða teimum at vera við í kvøld

Salzburg (Sosialurin)
Føroyski hópurin er rættiliga væl fyri til dystin í kvøld, verður hugsað um skaðar.

Eingin av spælarunum hevur nakað álvarsligt at dragast við, og seinnapartin í gjár bendi alt á, at allir sum eru í hópinum, kunnu vera »fit for fight« á Casino Salzburg Stadion í kvøld.

Undir venjingini mánakvøldið fingu Abraham Hansen og Allan Mørkre onkrar smærri snuddir, sum tó neyvan fara at forða teimum í at gera sítt besta í kvøld.

Teir fyrru dagarnar hava onkrir aðrir spælarar eisini havt okkurt at dragast við, men tað fór burtur av sær sjálvum og við góðari hjálp frá læknanum Jóhan Petur Davidsen og fysioterapeutinum Sigrun Danielsen.

hj.

Allan Mørkøre fekk snudd í dystinum ímóti Jugoslavia